# Taktiskur Ottesen vann kortspælið

**HONDBÓLTUR** Dia Midjord, venjari hjá VÍF, kom langt við sínum essi, men hann var ov stuttur tá avtornaði. – Eg spældi kortini rætt, tí vit høvdu fleiri kreftir seinastu løtuna, sigur Jan Ottesen




*Eli Muller. Málverjin hjá VÍF var stórspælandi í fyrra hálvleiki, og hann hevði eisini fleiri bjargingar eftir steðgin. Tað var hinvegin ikki nógmikið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Jan Ottesen kundi endiliga lata seg fagna, tá Gert Hansen fór í skjótálop í síðsta álopinum. Hann sendi framvið Eli Muller. 27-25 til KÍF.

– Eg eri errin av mínum spælarum, sigur Jan Ottesen.

Eftir eitt langt, drúgt og taktiskt kortspæl millum venjararnar, hava kollfirðingar beina kós í finaluna.

Jan Ottesen hevði betri kort á hondini, tá kortspælið byrjaði. Venjarin hjá KÍF hevur ein breiðari hóp, og fleiri fólk at velja ímillum, enn Dia Midjord, venjari hjá VÍF. Hinvegin hevði ovastin hjá vestmenningum eitt ess í hondini, sum hann kom langt við. Ein stórspælandi Eli Muller millum stengurnar. Eitt slíkt kort hevði Jan Ottesen ikki.

## Ottesen var taktiskur

Dia Midjord legði bragdliga fyri.

Tað kom illa við hjá Jan Ottesen, at Arnbjørn Hansen fekk reytt kort eftir 10 minuttum. Hansen steðgaði Sámal Jákupi Djurhuus, sum var á veg í skjótálop, og dómararnir vístu kollfirðinginum av vøllinum.

VÍF fór framum við fýra málum í fyrra hálvleiki, og KÍF rann bara aftaná. Eli Muller vardi meistarliga fyri í fleiri førum, meðan Dia Midjord fekk eisini nógv burtur úr Áka G. Olsen, sum var toppskjútti hjá VÍF.

Jan Ottesen skifti nógv út. Tað tóktist sum, at venjarin visti ikki, hvat loysti seg best. Samstundis fóru Dia Midjord og VÍF frá kollfirðingum.

## Goymdi orkuna

Jan Ottesen gagnnýtti hinvegin sín fyrimun at hava breiðari hóp. Umframt tað, var hann heppin í kortspælinum. Essið hjá Dia Midjord viknaði í seinna hálvleiki.

– Munurin á fyrra hálvleiki og seinna hálvleiki er fremst av øllum Eli Muller. Hann stendur ikki eins væl eftir steðgin. Tað skal eisini sigast, at tað er meira veiggj í okkara álopsspæli eftir steðgin, sigur Jan Ottesen.

Tað kom illa við hjá Dia Midjord, at orkan hjá vestmenningum gekk spakuliga undan. Hann hevði ikki somu kort, ella eins breiðan hóp, at velja millum sum mótstøðumaðurin. Tað visti Jan Ottesen.

– Eg spældi kortini rætt, tí vit høvdu fleiri kreftir seinastu løtuna. Vit spæla ikki væl, og dysturin er rótutur, heldur venjarin hjá KÍF.

Kollfirðingar fóru framum, tá fimm minuttir restaðu í. VÍF royndi at trýsta, men KÍF tóktist hava tamarhald á støðuni. Kollfirðingar vunnu 27-25, og Jan Ottesen vann taktiska kortspælið móti Dia Midjord. Venjarin hjá VÍF kundi ikki spæla síni kort stórvegis øðrvísi, enn hann gjørdi.

## Nærkast finaluni

KÍF er nú fimm stig framman fyri VÍF, sum er nummar trý. Kollfirðingar hava eisini spælt ein dyst færri. KÍF hevur beina kós í finaluna, og gamla og slitna vendingin, at – nú taka vit bara ein dyst í senn og síggja, hvussu langt tað røkkur, – liggur ikki til Jan Ottesen.

Hann veit, at líkindini er stór fyri, at KÍF verður í finaluni.

– Nú sær sera ljós út, og vit tóku eitt risa fet nærri finaluplássinum í dag. Vit kunnu bara takka okkum sjálvum, um tað gongur galið, slær Jan Ottesen fast.

*uni@sosialurin.fo*

---

**VÍF – KÍF** 25-27 (15-11)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 6-4**
**20 min.: 11-6**
**40 min.: 19-17**
**50 min.: 23-21**

**VÍF:** Áki G. Olsen 7, Sámal Joensen 5, Joen Pauli Høgnesen 3, Rúni Fossdal 3, Bjarti Hansen 3, Magnus Muller 2, Holgar Durhuus 1, Sámal Jákup Djurhuus 1.
**KÍF:** Gert Hansen 10, Ási Dam 4, Jákup Trygvason 4, Andrias Nielsen 3, Teitur Joensen 3, Regin Petersen 2, Niklas Reginsson 1.
Útvísingar: VÍF 6, KÍF 2.
Reytt kort: Arnbjørn Hansen, KÍF

**Kyndil – Team Klaksvík** 37-27 (18-13)

Dómarar: Thomas Juul Thomsen og Magnus í Króki

**10 min.: 6-4**
**20 min.: 11-6**
**40 min.: 25-18**
**50 min.: 31-23**

**Kyndil:** Andrias Sólsker 7, Bárður Johannesen 7, Rúni Johansen 6, Høgni Klein-Olsen 5, Randi Ellingsgaard 4, Ludvík Súnason 2, Gunnar Wardum 2, Kristoffur Kristoffersen 2, Torvald Abrahamsen 1, Hans A. Thomsen 1.
**Team Klaksvík:** Hanus Norðberg 10, Zarko Pejovic 6, Steffan Kalsø 3, Sámal T. Olsen 2, Beinur Heðinsson 2, Jens Pauli Mohr 2, Dánjal Kjærbo 1, Fríðin Ziskason 1.
Útvísingar: Kyndil 3, Team Klaksvík 2.

**H71 – Neistin** 21-28 (11-16)

Dómarar: Dánjal Samuelsen og Heri Petersen

**10 min.: 3-3**
**20 min.: 5-9**
**40 min.: 15-18**
**50 min.: 17-24**

**H71:** Rógvi Sørensen 4, Dánjal Tórgarð 4, Esbern Patursson 4, Rúni V. Højgaard 2, Bogdan Florea 2, Bogi Krossteig 1, Poul Kjartan Dam 1, Hans Kári Hansen 1, Magnus á Rógvi 1.
**Neistin:** Áki Mørk 7, Karl Herup Olsen 6, Finnur Hansson 5, David Edvardsen 5, Rósing Rasmussen 2, Jugoslav Djumic 2, Heini Ragnarsson 1.
Útvísingar: H71 4, Neistin 5

**Atlantic Airways Deildin** *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 16 | 559 | 428 | 131 | 31 |
| 2 | KÍF | 15 | 429 | 386 | 43 | 21 |
| 3 | Kyndil | 16 | 413 | 411 | 2 | 17 |
| 4 | VÍF | 16 | 444 | 409 | 35 | 16 |
| 5 | H71 | 14 | 360 | 372 | -12 | 12 |
| 6 | StÍF | 15 | 371 | 385 | -14 | 9 |
| 7 | Team Klaksvík | 14 | 318 | 503 | -185 | 0 |

---

# H71 varð bumbað niður

**HONDBÓLTUR** Neistin hevur ongan stórskjútta, men fleiri skjúttar. Tað dugdu hoyvíkingarnir ikki at handfara

Uni Holm Johannesen

Carl Herup Olsen, David Edvardsen, Áki Mørk og Finnur Hansson býttu hesa ferð málini millum sín.

Neistin hevur ikki havt nakran stórskjútta í hesum kappingarárinum. Og tað vísir seg at vera ein stórur fyrimunur, tí allir taka ábyrgd í álopsspælinum. Verður Áki Mørk mansvardur, skýtur ein annar málini. Verður Finnur Hansson mansverður, skýtur ein annar málini. Soleiðis er tað hvørjaferð.

Hoyvíkingarnir vistu ikki, hvussu teir skuldu verja fyri Neistanum í gjár. Oddaliðið vann greitt við sjey málum, 28-21.

Ingi Olsen og Heini Hanusarsson vóru ikki við hjá Neistanum, men tað gjørdi ikki petti. Styrkin og breiddin á liðnum er ræðandi, og sigurin var enn ein staðfesting av, at eingin steðgar Neistanum.

---

# Kyndil livir í vónini

**HONDBÓLTUR** Tað var bara ein avgreiðsluspurningur í høllini á Hálsi í gjár. Kyndil er numm trý og skal á vitjan hjá KÍF næsta vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Kyndil vann 37-27 á Team Klaksvík í gjár. Tað var mest sum tað.

Grønlittu havnarmenninir fyrireika seg nú til seinastu royndina at bjóða av í stríðnum um finalupláss.

Kyndil er fýra stig aftan fyri KÍF, sum hevur spælt ein dyst minni. Liðini hittast í høllini í Kollafirði næsta vikuskifti, og tá hevur Kyndil sín seinasta møguleika.

## Avgreiðsluspurningur

Team Klaksvík er ein avgreiðsluspurningur hjá hinum liðunum í bestu mansdeildini. Tað ráddi eisini bara um hjá Kyndil at greiða sín setning og fáa tvey stig í gjár.

Heimaliðið fór undan klaksvíkingunum í smáum, og munurin var 10 mál tá avtornaði.

Andrias Sólsker og Bárður Johannesen, Kyndil, vóru toppskjúttar við sjey málum hvør.

*uni@sosialurin.fo*